sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Blaðfólk: Dagny Joensen, Áki Bertholdsen, Emil L. Jacobsen, Sveinur Tróndarson, Turið Kjølbro

Ljósmyndari: Jens Kristian Vang
Lýsingar og søla: Jonhard Hammer

Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo

# Franskt lógloysi og danskt ábyrgdarøki

## *Oddagrein*

EIN føroyskur borgari situr „fangi" á fronsku oynni Réunion uppá sætta mánað. Sigmundur Andreassen var skipari umborð á einum suðurafrikonskum báti, tá hann varð tikin í suðurindiska havinum og fluttur til fronsku oynna undir strongum hermannaeftirliti.

PASSIÐ varð tikið frá honum, og hann hevur framvegis ikki fingið tað aftur, og kann tí ikki fara av oynni. Sigmundur bíðar og bíðar og bíðar. Hann bíðar eftir at kunna fara í rættin og verja sína søk. Men franski dómarin í oynni letst ikki um vón. Sigmundur er tí í veruleikanum fangi á fronsku oynni.

HVUSSU kann eitt franskt hjáland loyva sær at vanvirða borgarar úr einum vestureuropeiskum landi á henda hátt. Hvussu kann eitt land, sum er limur av ES loyva „wildwest" og apartheid-líknandi tilstandum at ráða í einum av sínum hjálondum? Skriva vit ikki skjótt ár 2000 og tosa við ikki um eitt siviliserað land við demokratiskum traditiónum - Frakland!!!

VIT mótmæla harðliga framferðini móti Sigmundi Andreassen, sum hevur fullan rætt til at fáa sak sína fyri rættin og har kunna verja seg. At halda mannin í oyggjavarðhaldi á henda hátt er einki minni enn brot á mannarættindini. Allir borgarar hava krav uppá at fáa søk sína fyri rættin, men tað vilja ákærumyndugleikarnir á Réunion altso ikki. Og vit kunnu spyrja hví? Verður hann bert brúktur - les misbrúktur - í einum politiskum og handilsligum spæli, sum hevur til endamál at gagna fronskum peningaáhugamálum?

HÓAST danskir og føroyskir myndugleikar hava roynt sítt, so tykist einki hjálpa. Nú frættist, at franski uttanríkisráðharrin skal á vitjan í Danmark. Vit fara tí á hesum stað at heita á danska uttanríkisráðharran at taka málið upp á hægsta stigi. Tað eru danir, sum umsita okkara uttanríkismál, og eigur spurningurin eisini at verða settur her, um danir í heila tikið hava víst hesum máli nóg stóran ans. Hava danskir myndugleikar røkt sínar skyldur í Réunionmálinum? Vit loyva okkum at ivast og vilja tí minna Nyrup-stjórnina á, at hon her hevur ein trupulleika, sum hon er pliktað til at loysa. Vit mugu bara biðja til, at føroyski skiparin ikki bukkar undir og gevur skarvin yvir. Vit mugu vóna, at hann megnar at standa móti hesum stóra trýstinum, men skuldi tað hent - sum eingin vónar hendir - at føroyski skiparin ikki bara boð aftur í bý - tá kunnu vit av álvara tosa um eina gølu. Tá kann talan blíva um justistmorð ol. Hevur danska stjórnin samvitsku at liva við hesum - um ikki - so eigur hon at fáa hendurnar úr lummanum og fáa Sigmund Andreasen heim - ella í hvussu er geva honum sín demokratiska rætt at tala søk sína í rættinum. Tíðin er komin hartil, at bæði føroysku fólkatingsumboðini og eisini løgmaður eiga at venda sær til donsku stjórnina fyri enn einaferð at undirstrika álvaran í hesum máli. Gerið tað nú. Latið ikki franska uttanríkisráðharran sleppa úr aftur Keypmannahavn uttan at hann er vorðin konfronteraður við hesum fyri Frakland svarta bletti.

***Sosialurin***

## Viðmerking

# Nakrar hugleiðingar um fiskirættindi - fiskidagar - lógir

Í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap stendur í § 2 stk. 4 frá 10. mars 94:

Landsstýrið setir eina skipanarnevnd við umboðum frá vinnuni, Fiskirannsóknarstovuni, fiskivinnumsitingini og fiskiveiðieftirlitinum, sum á hvørjum ári, út frá tilmæli frá fiskirannsóknarstovuni og stovnsrøktarnevndini, metir um ásetta fiskidagatalið fyri hvønn bólk av fiskiførum tryggjar, at stovnarnir verða gagnnýttir burðardygt, og um skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum yvirhøvur tryggjar, at endamálini í hesi lóg verða rokkin. Nú skal løgtingið aftan á frítíðina lógveva um treytir til fiskivinnuna fyri næsta fiskiár, sum byrjar tann 1. september.

Vit, ið liva av at fiska, fáa at vita frá ymiskum frøðingum og fólki, ið ikki eru fiskimenn, hvussu dagatalið skal skerjast, og seinast havi eg hoyrt, at ein hagfrøðingur mælir til, at dagar, ið ikki eru nýttir í hesm fiskiárinum, skulu takast frá bátunum, eins og dagatalið skal skerjast 10%. Fyri okkum, ið reka fiskarí og hava roynt at spart uppá dagarnar, og hava keypt dagar, um vit nú eiga nakrar dagar eftir, ja, so skulu teir bara strikas,t ja, her eru vit so langt úti, at her eru ikki orð til staðar fyri tí frekleika, sum her verður borðreitt við.

Tá fiskidagaskipanin bleiv sett í gildi, fingu vit greitt at vita, at nú skuldi flotin fáa frið við somu fiskidøgum í næstu fimm árini, men nú fara menn, flestu teirra hava ongantíð pissað í saltan sjógv, út at skera enn meira niður.

Undirritaði kemur úr bólki 5 og vit eru skornir niður í eina helvt av fiskidøgum, so trupult verður at klára at gjalda bátarnar niður og at skaffa monnunum, sum við eru, eina rímuliga ársinntøku.

Um onkur bólkur tekur í meira lagi av einum hóttum fiskaslagí, ja, so átti tað at verið møguligt at skert viðkomandi bólk, ístaðin fyri at leggja eftir øllum.

Í 1996 bleiv ein bólkur kallaður »Endurskoðanarnevndin« sett, og kom við einum áliti um endurnýggjan av fiskiflotanum. Í bólkinum vóru 6 mans og av teimum eitt umboð fyri ávísan part av vinnuni.

Vit hava í dag hoyrt um eina nýggja fólkaskúlalóg, sum kemur í gildi, har vóru ØLL umboðini LÆRARAR.

Niðurstøðan frá endurskoðanarnevndini er umsetilig fiskirættindi, liberalisering av virkisøkinum hjá veiðuliðnum og tættari samstarv millum veiðulið, framleiðslulið og sølu. Ja, og harafturat kann nevnast, at skipini skulu vírka fiskin meira umborð. Úrslitið av hesum verður, at bert nøkur fá fabriksskip skulu eiga øll veiðurættindi við Føroyar, og tað sær út til at tað er henda prosess, sum endurskoðanarnevndin legði lunnar undir nú skal gjøgnumførast við hjálp av sitandi samgongu.

Tað skróvar í oyrunum, tá ein hoyrir, at tey skipini, sum ikki klára seg, ja, tey skulu bara út úr systeminum tann harða vegin, meðan tey, sum eru sanerað upp til fleiri ferðir og nú eru so bílig, at tey onki hava at gjalda, ja, tey skulu mynda komandi fiskiskipaflotan, skipini skulu sjálvandi endurnýggjast og landið skal gjalda fimti prosent av byggikostnaðinum.

**Theodor Poulsen,**
**Inni í Nesi,**
**Toftir**

P.S. Í kvøld tann 30. 7. hava vit hoyrt í Degi og Viku, at línuskipini, ið enn ikki hava funnið útav, at fiskur kann ísast í kassar, men framvegis nýta hillaskipan, við góðsku hareftir, skulu prioriterast enn meira fyri at hava fiskað meira enn tað tupulta av, hvat teirra partur er sambært galdandi fiskivinnulóg.

## Lesarabræv

# Umsetiligheit, einasta loysn?

Tað var gott at hoyra tveir politikarar í útvarpinum herfyri úttala seg um umsetiligheit innan fyri fiskidagaskipanina. Teir lupu ikki framat, men tordu at seta eitt spurnartekin við, hvussu langt eigur at farast fram á hesm øki. Og tað er tað góð grund til. Líka so væl sum tað ber til at vísa á fiskifrøðingar, ið ikki trúgva uppá at veiðitrýstið hevur nakra ávirkan á stovnsrøktina, líka so væl ber tað til at vísa á fiskifrøðingar, ið ikki trúgva uppá at veiðitrýstið hevur nakra ávirkan á stovnsrøktina, líka so væl ber tað til at peika á økonomar, sum halda at grundarlagið undir víkaðari umsetiligheit, nevnliga økonomimodellini, ikki kunnu brúkast í umsiting av fiskarípolitikki.

Eg vóni, at í kjakinum, sum nú fer at taka seg upp í tinginum í sambandi við broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, verður reistur fylgjandi spurningur: »Gongur einasta leiðin til eina lívfrøðiliga og burðardygga fiskivinnu gjøgnum fulla umsetiligheit av fiskirættindum?«

Eitt av sterkastu argumentunum fyri umsetiligum fiskidaga(kvotu)rættindum er, at tá rættindini koma undir skipað ognarviðurskifti, vil eigarin altíð løgga um hesi rættindi og royna at varðveita virði á teimum. M.a. við sjálvbodnari stovnsrøkt. Ein kundi so verið eitt sindur spískur og spurt, um stovnsrøkt er tað sum liggur norðmanninum Kjeld Inge Røkke fremst í huganum, tá hann umsitur og handlar við sínum fiskirættindum. ið umfata milliónir av tonsum.

Eisini vóni eg at spurningurin um umsetiligir fiskidagar er svarið fyri allan partin av flotanum, sum fiskar undir Føroyum, verður umrøddur. M.a. um ikki útróðrarflotin hjá okkum við sínum skapi og fiskaríinnsatsi er komin niður á eitt sjálvregulerandi støði

Sum limur í skipanarnevndini kann eg bert undrast á tær niðurstøðurnar, sum eru gjørdar, grundað á tilmælið og frágreiðingina. Bæði millum politikarar og pressuna. Eg haldi man hevur bara lisið tað, sum man vildi lesa. Avgerðin um niðurskurð passar meir inn í eina politiska samráðingarloysn, enn í arbeiðssetningin: **at finna út av um fiskidagaskipanin er brúkbar ella ikki.**

**Chris Jan Michelsen,**
**800 Tvøroyri**

SOSIALURIN
HEVUR
TÍÐINDINI